

# 4 tímar á muni

Tað er ikki so nógv sjálvur lønarkarmurin, sum forðar fyri eini semju ímillum lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum øðrumegin og Skipara- og Navigatørfelagið hinumegin um yvirmenninnar hjá Strandferðsluni.

Lønardeildin hevur bjóðað teimum somu lønarhækkingar, sum øll hini hava fingið.

Men feløgini leggja dent á, at tey vilja eisini samráðast um arbeiðstíðina hjá yvirmonnunum.

Altjóða sáttmálar, sum Føroyar eru við í, eru broyttir í seinastuni og her er talan um sáttmálar, sum avmarkar arbeiðstíðina og leingir hvílitíðina hjá yvirmonnunum.

Og Maskinmeistarafelagið og Skipara- og Navigatørfelagið vilja ikki gera nýggjan sáttmála, sum ikki speglar broytingarnar í altjóða sáttmálunum.

Fyri at siga tað so einfalt, sum gjørligt, hava yvirmenninir hjá Strandferðsluni eina arbeiðstíð upp á 49 tímar um vikuna.

Í heilt rundum tølum føra hesar broytingarnar við sær, at arbeiðstíðin hjá yvirmonnunum skal styttast fýra tímar, niður í 45 tímar um vikuna.

Men hetta skal gerast uttan at lønin lækkar, tí feløgini fara undir ongum umstøðum at góðtaka, at nýggi sáttmálin verður verri enn tann, sum fer úr gildi.

Samstundis vilja feløgini ikki góðtaka, at yvirmenninir hjá Strandferðsluni fáa nýggj setanarskriv við lægri lønarbrøki, tá ið túrar verða lagdir burtur ímillum.

## Skulu fylgjast

Hetta vil lønardeildin ikki hoyra talan um.

Snorri Fjallsbak, leiðari á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, staðfestir, at verður arbeiðstíðin stytt, skal lønin eisini lækka.

- Tað, sum fakfeløgini vilja hava, er, at arbeiðstíðin skal styttast, men at lønin skal ikki fylgja við niðureftir.

- Men tað gongur aldrin, tí lønin skal fylgja arbeiðstíðini, sigur Snorri Fjallsbak.

aki@sosialurin.fo

# Bíða eftir friði

Tað er í øllum førum greitt, at tað verður ikki beinanvegin, at skipini hjá Strandferðsluni verða friða fyri arbeiðsstøðgum

Sostatt er greitt, at endar hendan semingsroyndin ímillum yvirmannafeløgini og Fíggjarmálaráðið, úrslitaleysar, verða strandfaraskipini løgd einaferð enn.

Samráðingarnar eru slitnaðar og semingsmenninir eru boðsendir og teir fara undir semingsroyndina fyrsta dagin.

– Tað er undir øllum umstøðum greitt, at tað verður ongin semja um Strandferðsluna fyrrenn tær sáttmálasamráðingarnar eru avgreiddar og tað er friður á økinum, sigur Selma Ellingsgaard.

Hon sigur, at høvdu tey farið undir samráðingarnar um at friða Strandferðsluna nú, hevði tað órógva samráðingarnar hjá fakfeløgunum.

Tað hevði verið at trekt tenninar úr Skipara- og Navigatørfelagnum og Maskinmeistarafelagnum og tað kemur sjálvsagt ikki upp á tal, leggur hon afturat.

– Tí fara vit undir øllum umstøðum ikki at hava fund um málið aftur, fyrrenn nýggjur sáttmáli er gjørdur.

# Fer at kosta

– Skulu fakfeløgini siga verkfalsrættin frá sær, fer tað sjálvandi at kosta.

Tað staðfestir Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Sum sagt í aðrari grein her á síðuni, verður nú roynt at finna semju um at frítaka Strandferðsluna fyri arbeiðssteðgir á arbeiðsmarknaðinum.

Men hóast hon ikki vil siga so nógv um tað ítøkiliga í ætlanini, staðfestir hon kortini, at skal ein semja finnast, verður støðan undir øllum umstøðum tann, at fakfeløgini noyðast at siga verkfalsrættin frá sær.

Tað, sum oftast hevur verið nevnt, er, at gera fáa eina tænastumannalíknandi skipan fyri øll tey, sum hava við skipini hjá Strandferðsluni at gera.

Men so kunnu tey heldur ikki fara í verkfall.

Og nettupp verkfalsrætturin er ein serstakliga grundleggjandi spurningur hjá fakfeløgunum.

– Tað er sjálvsagt, at skulu vit sigaverkfalsrættin frá okkum fer at kosta fíggjarmálaráðnum eina eyka lønarhækking, tí vit geva ikki so grundleggjandi rættindi frá okkum fyri einki, sigur Selma Ellingsgaard.

# Skal loysast við samráðingum

Løgtingið skal nú taka støðu til, um øll øki í landinum skulu javntsetast, hvat í samferðslu viðvíkur, tá ið arbeiðssteðgur er

Tað er Tjóðveldi, sum hevur lagt uppskot fyri Løgtingið. Flokkurin vil hava Løgtingið at samtykkja at heita á landsstýrið um beinanvegin at taka samráðingar upp við fakfeløg á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum um at frítaka skipini hjá Strandferðsluni fyri arbeiðssteðgir.

Tjóðveldi staðfestir, at nú 85% av fólkinum er samanbundið við tunlum og brúm, er tað serliga Suðuroyggin, Sandoyggin, Nólsoyggin og partvíst aðrar oyggjar, ið verða raktar, tá ið arbeiðssteðgur er.

Her er tað talan um, at tað tað eru landsvegirnar hjá hesum økjum, ið verða rakt.

Umframt at skula liva við avleiðingunum av arbeiðssteðgi, verða hesi øki tvífalt rakt, av tí at allir møguleikar fyri vanligari samferðslu, steðga.

– At hetta hevur djúptøknar avleiðingar fyri fólk, familjur, vinnu og vøruflutning, er eyðsæð, sigur flokkurin.

Men Tjóðveldi heldur, at talan er eisini um ein trygdarspurning, av tí, at fólk verða noydd at finna meira ella minni alternativar samferðsluvegir.

Flokkurin heldur fast um frælsa samráðingarrættin og tí eru samráðingar ímillum partarnar um eina semju, tann rætta loysnin.

Løgtingið fer at viðgera uppskotið í næstum.